


Tórshavnar kommuna fer nú undir at rudda upp á øllum almennum vegum og økjum, sum kommunan ræður yvir.

Talan er um akfør, bátar, reiðskap, amboð og tílíkt, sum fólk hevur sett frá sær, men sum einki frámerki hevur um, hvør eigarin er.

Heitt verður á øll, sum hava slíkar lutir standandi á kommunalum økjum, um at beina teir burtur sum skjótast og innan eina viku.

Lutir, sum ikki eru burturbeindir í seinasta lagi 7. juli 2008, verða burturbeindir av Tórshavnar kommunu uttan aðra ávaring.

Tórshavnar kommuna tekur samstundis fyrivarni fyri at krevja allar útreiðslur í hesum sambandi endurgoldnar frá eigaranum.

Heitt verður eisini á øll, sum hava slíkar lutir á privatum økjum, og hesir kunnu metast sum órudd, um at beina teir burtur sum skjótast.

Tórshavnar kommuna

